# Lena kann koma langt

**– Eg hevði ikki brúkt tríggjar mánaðir til at seta meg í samband við plátufeløg og onnur um Lenu, um eg ikki helt, at hon hevði ein møguleika, sigur bretin Richard Ogden, sum nú arbeiðir fyri at fáa Lenu Anderssen fram uttanlands**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Tey sendu mær fløguna, eg lurtaði eftir henni og dámdi hana, og so játtaði eg at hjálpa teimum.

Soleiðis greiðir Richard Ogden frá um, hvussu hann kom í samband við Lenu Andersen og Niclas Johannesen, og hvussu einfalt tað í grundini var, at hann kom at arbeiða fyri tey.

Richard Ogden er eitt kent navn í tónleikavinnuni. Hann hevur havt fleiri leiðandi størv innan tónleikin, og hann er eisini kendur sum umboðsmaður hjá Paul McCartney.

Nú hevur hann sítt egna felag, har hann roynir at føra nøkur fá tónleikanøvn fram. Eitt teirra er Bomfunk MC´s, sum hann hevur stílað fyri í nógv ár, og so føroyska Lena Anderssen.



*Lena kann saktans koma langt, hon hevur eina serstaka rødd, og samstarvið millum hana og Niclas er sera gott. Mær dámar sjálvur betur teir persónligu sangirnar hjá Lenu, heldur enn tann meira popputa tónleikin, sigur Richard Ogden*

– Fløgan hjá Lenu er framúr góð, og mær dámar tónleikin alsamt betur, sum tíðin gongur, sigur Richard Ogden.

### Verið víða í tónleikinum

Richard Ogden byrjaði sína yrkisleið innan tónleikin í 1960'unum. Tá fór hann at skriva um tónleik, og í 1971 fekk hann starv í plátufelagnum United Artist, har hann skuldi røkja PR-arbeiðið hjá felagnum.

Nøkur ár seinni byrjaði hann sum umboðsmaður hjá nøkrum bólkum, og tað helt hann fram við, til hann í mitt í 1980'unum fór aftur at starvast fyri eitt plátufelag – hesaferð var tað Polydor – og hann var stjóri fyri felagið fram til 1987, tá ið hann varð biðin um at gerast manager hjá Paul McCartney og táverandi konu hansara, Lindu.

Hann starvaðist saman við Beatlanum fram til 1993, tá ið hann fekk leiðandi starv á marknaðardeildini hjá Sony Europe.

Fyri fýra árum síðani gavst Richard Ogden at arbeiða fyri Sony, og hann hevur síðani arbeitt meira fyri seg sjálvan. Fyrst hevði hann eitt felag saman við einum týskum felag, men fyri tveimum árum síðani keypti hann týskarnar út og hevur havt sítt egna felag – ROM.

### Norðurlond fyrst fyri

Richard Ogden hevur seinastu tríggjar mánaðirnar arbeitt við at føra Lenu Anderssen fram, og hann hevur í fyrstu syftu vent kikaranum ímóti Danmark og Noregi, har hann roynir at fáa ein avtalu í lag við okkurt felag, sum hevur hug at geva tónleikin hjá Lenu út.

– Fyrsta málið verður at fáa eina licence-avtalu uttanfyri Føroyar, so at tónleikurin hjá Lenu kann gevast út aðrastaðni enn í Føroyum. Vit stíla fyrst eftir Noregi og serliga Danmark, sigur Richard Ogden.

Grundarlagið undir eini sonevndari licence-avtalu, sum snýr seg um at geva innspældan tónleik út hjá onkrum felag, er fløgan hjá Lenu, sum kom út í fjør.

– Fløgan er frálík, og vit hava gjørt onkrar broytingar á fløguni, og vit hava tikið sangin I Still Love You, sum var eitt stórt hitt í Føroyum, við á fløguna, greiðir Richard Ogden frá.

– Tað snýr seg um at taka fyrsta fetið inn á europeiska meginlandið, og tað kann eins væl gerast í Danmark ella Noregi, sum í onkrum øðrum landi.

### Lena hevur møguleikar

Richard Ogden heldur, at Lena hevur góðar møguleikar at koma fram við sínum tónleiki.

– Eg hevði ikki brúkt tríggjar mánaðir til at seta meg í samband við plátufeløg og onnur um Lenu, um eg ikki helt, at hon hevði ein møguleika. Lena kann saktans koma langt, hon hevur eina serstaka rødd, og samstarvið millum hana og Niclas er sera gott. Mær dámar sjálvur betur teir persónligu sangirnar hjá Lenu, heldur enn tann meira popputa tónleikin, sigur Richard Ogden.

– Eg eri ongantíð farin skeivur við tónleikarum. Eg havi ongantíð sagt nei til nakran bólk, sum seinni hevur fingið gjøgnumbrot. Tá eg fái okkurt bjóða, so veit eg skjótt, um tað hevur nakran kjans ella ikki, sigur hann.

Og tað skuldi givið greiðar ábendingar um, at Lena hevur ein møguleika – í øllum førum heldur Richard Ogden tað.

## FAKTA

### Richard Ogden

Richard Ogden hevur sítt egna umboðsfelag, ROM – Richard Ogden Management. Hann hevur skrivstovu í London, har hann hevur trý fólk í starvi.

Hann byrjaði sína yrkisleið innan tónleikin sum pressumaður hjá United Artists í 1991. Seinni gjørdist hann umboðsmaður fyri ymiskar bólkar. Mitt í 80'unum tók hann við sum stjóri í plátufelagnum Polydor UK.

Frá 1987 til 1993 var hann persónligur umboðsmaður hjá Paul og Lindu McCartney.

Í 1993 fór hann í leiðandi starv á marknaðardeildini hjá Sony Europe, og har stavaðist hann fram til 2000. Millum nøvnini, sum hann hevði tætt samstarv við, vóru Ricky Martin og Céline Dion.

Seinastu fýra árini hevur hann aftur verið umboðsmaður í sínum egna felag, og í løtuni umboðar hann nøvn sum Bomfunk MC´s, TAT og Lenu Anderssen.

# Salt kryddar jólakonsert

**MC Restorff, Salt og Petsi Tvørfoss syngja sunnudagin á jólakonsert, sum verður í ítróttarhøllini á Kambsdali**

KONSERT
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað verður nýtt og gott gamalt á skránni, tá ið í ÍF Stuðlar skipa fyri jólakonsert í ítróttarhøllini á Kambsdali sunnudagin.

Fløguaktuelli sangbólkurin Salt fer at syngja, songkvinnan Petsi Tvørfoss fer at spæla saman við føroyskum bólki, og MC Restorff fer at syngja nakrar sangir.

Hesi hava á hvør sín hátt gjørt vart við seg í føroyskum tónleikalívi – onkur munandi longur enn annar – men samansetingin ger, at tað skuldi verið eitt sindur til allar aldursbólkar.



*Petsi Tvørfoss fer at syngja á jólakonsertini í ítróttarhøllini á Kambsdali*

### MC leggur fyri

Fyrstur á pallinum verður MC Restorff, sum í fleiri ártíggjund hevur verið virkin í føroyskum gospeltónleiki. Sangirnir hjá MC – bæði teir, sum hann hevur skrivað sjálvur, og teir, sum hann hevur týtt – eru landskendir.

MC hevur eisini gjørt nakrar frálíkar endurinnspælingar av kendum sangum og sálmum til onkra av sínum útgávum.

Á konsertini á Kambsdali fer MC at sita einsamallur við klaveri. Hann fer at syngja nakrar jólasangir, og helst trívir hann eisini í onkran av sínum sangum.

### Salt kryddar

Herfyri kom sangbólkurin Salt við sínari fyrstu útgávu. Hetta er fløga við a capella kórsangi og poppsangum, og tað verða sangir av hesi fløgu, sum bólkurin fer at syngja á Kambsdali sunnudagin.

Salt er mannað við sjey ungum fólkum úr Eysturoynni, sum í seks ár hava vant og sungið saman.

### Petsi við góðum stuðli

Seinast á konsertini fer Petsi Tvørfoss at syngja. Føroyska songkvinnan, sum hevur búð í Danmark nógv tey seinnu árini, gjørdist kend, tá ið hon kom við í danska Grand Prixið. Har stóð hon seg væl, og síðani hava javnan boð verið eftir henni til tiltøk í Føroyum.

Petsi kann syngja nógvar ymiskar tónleikastílir, og hesaferð verða jólasangir og annað á skránni. Helst verður hon eisini noydd at tríva í Grand Prix-sangi, Mest Når Det Er Regn.

Afturat sær á pallinum hevur Petsi bólkin Showmenn, og tað er ein framúr góður og væl samanspældur bólkur, sum er mannaður við Kim Hansen, Jens Marna Hansen, Jóhannus á Rógvu Joensen og James Olsen.

Jólakonsertin í ítróttarhøllini á Kambsdali verður sunnukvøldið 5. desember kl. 20.00. Atgongumerki kunnu keypast í forsølu og fáast við dyrnar ein tíma áðrenn konsertina.